## Tørvur á læknum

Læknarnir, sum taka sær av ambulantu viðgerðini á sjúkrahúsinum í Nuuk, hava úr at gera. Umframt at taka sær av fólki, sum skulu hava skjóta hjálp, skulu læknarnir eisini røkja ellisheimið, skúlar og aðrar uppávur. Men tað er trupult. Kent Kleinschmidt, læknastjóri, sigur við KNR, at sjúkrahúsið hevur ov fáar læknar, og nógvir av verandi læknum nærkast pensjónsaldri. Aðrir gaevast áðrenn, tí arbeiðsbyrðan er ov stór, sigur hann.



## Suðuroyingar onki útvarp

Ódnarveðrið gjørdi, at sendinetið í Suðuroynni fór. Sendarin á Hestinum riggaði ikki um vikuskiftið og suðuroyingar høvdu onki FM frá fríggjadegi til einaferð sunnudagin. Hetta er óheppið, tí sendinetið er partur av neyðtilbúgvingini, og millumbylgjusendarin kann vera svikaligur, skilst. Um vikuskiftið bar best til at hoyra útvarp í Suðuroynni við teldu. Enn eru hoyrilíkindini ikki góð í Suðuroynni og Kringvarpið hoyrist ikki væl. Sambært Kringvarpinum sunnudagin, so sendir sandarin á Hestinum enn ikki við fullari megi. Útsýnið vestur á Eiðið í Vági í kavaveðrinum leygardagin (Mynd; D. Olsen)

# Føroya Tele tveir stórar kundar á

**Í november fræftist, at Føroya Tele hevði fingið fyrsta kundan á SHEFA2, sum er British Telecom, men felagið hevur eisini gjørt avtalu við BP (British Petroleum) um kapasitet á kaðalinum, sum verður virkin um ikki so langa tíð. Onnur hava eisini víst hesum nýggja møguleika áhuga**

FJARSKIFTI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var í november í fjør, at Føroya Tele kunngjørdi, at samtakið hevði fingið fyrsta kundan á SHEFA2-kaðalinum. Talan er um British Telecom, sum kemur at keypa kapasitet á leiðini millum Norðurskotland, Orknoyggjar og Hetland. Avtalan millum partarnar fevnir um 15 ár. Hvat hon ítøkiliga merkir í krónum og oyrum, hevur Føroya Tele ikki kunngjørt, men samtakið hevur sagt, at talan er um tveysiffraða miljónaupphædd fyri føroyska samskiftisveitaran.

Kristian Davidsen, samtaksstjóri í Føroya Tele, sigur, at ein onnur avtala, sum samtakið eisini hevur gjørt um keyp av kapatiseti á kaðalinum, er við British Petroleum og platformarnar hjá felagnum á leiðini.

- Hendan avtalan er eisini undirskrivað, men er ongantíð veruliga almannakunngjørd. Vit arbeiða við eini loysn, hvussu íbindingin til platformarnar skal verða, og her er kanska okkurt, sum skal gerast øðrvísi.

Hann sigur, at umframt avtalurnar við British Telecom og British Petroleum, hevur felagið samband við aðrar potentiellar kundar, sum eru áhugaðir í eini avtalu um keyp at kapasiteti.

- Men enn fyriliggur einki ítøkiligt um aðrar avtalur, leggur hann aftrat.

### Meira fyri pengarnar

Í seinastuni hevur verið gjørt burtur úr, at prísirnir á breiðbandi eru hægri í Føroyum enn í okkara grannalondum.

Tí spurdu vit samtaksstjóran í Føroya Tele, hvør prísgongdin væntandi verður.

- Mítt boð er, at tendensurin í Føroyum verður hin sami, sum vit síggja aðrastaðni – at tú fert at fáa meira fyri sama pening, og soleiðis verður breiðbandið lutfalsliga bíligari, sum tíðin gongur.

Kristian Davidsen vísir á, at SHEFA2-kaðalin er ein stór íløga fyri Føroya Tele,



sum hevur ein avmarkaðan marknað innan føroysku landoddarnar.

- Men við tað, at fleiri útlendsk feløg og fyritøkur væntandi fara at keypa sær kapasitet á kaðalinum, kemur hetta at merkja, at fleiri verða við til at gjalda íløguna, og tað kemur aftur at gera íløguna meira lønandi.

Stjórin sigur, at uttan SHEFA2 høvdu Føroyar í framtíðini havt eitt "haltandi" samband, sum hevði ligið lamið av og á.

- Tá høvdu vit ikki kunnað ment okkum sum nú við høgari ferð á netinum. SHEFA2 kemur at geva okkum óavmarkaða ferð og møguleikar, leggur hann aftrat.

# Fiskivinnuskúlin í Vestmanna fær skap

**Tað er ein tíð, síðan A/S MT Højgaard byrjaði at stákast inni á Fjørð í Vestmanna, har nýggi Fiskivinnuskúlin skal byggjast, og herfyri komu fyrstu formarnir upp at standa**

SKÚLABYGGING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var felagið A/S MT Højgaard, sum vann lisitatiónina upp á nýggja Fiskivinnuskúlan í Vestmanna. Tilboðið hjá felagnum var stívliga 22,4 miljónir krónur, meðan P/F Articon bjóðaði sær at gera arbeiðið fyri 23,3, og Sp/f Viking Smíð helt seg til 23,9 miljónir krónur.

Tekniskir ráðgevarar í byggingini eru Sp/f MAP Arkitektar, P/F Sofus M. Jakobsen og P/F KJ Elráð.

Sambært fyriliggjandi ætlan, verður miðjað eftir, at skúlin stendur liðugur tíðliga í ár 2009.

Samlaði kostnaðurin at verkætlanini verður helst einar 29 miljónir krónur.

Tað er ein tíð síðan, at MT Højgaard fóru í holt við kloakk-og planeringsarbeiði, og herfyri vórðu so fyrstu formarnir settir upp.

So hvørt, sum vikurnar fara at ganga, fara vit eisini at síggja, at betongveggirnir koma upp at standa, og skúlin fer at taka skap.

Nýggi Fiskivinnuskúlin í Vestmanna verður bygdur á parkeringsøkinum inni á Fjørð. Pláss verður fyri umleið 100 næmingum. Í skúlanum verða tríggjar vanligar skúlastovur og ein serstova. Aftrat hesum verða fimm bólkarúm, auditorium og onnur høli.

Tað var landsstýrismaður í skúlamálum, Jógvan á Lakjuni, sum legði uppskotið fyri løgtingið um at byggja nýggjan Fiskivinnuskúla í Vestmanna.

Arbeiðsánari er Mentamálaráðið, og Landsverk er byggiharri.



*Fyrstu formarnir komu upp at standa herfyri*
*Mynd: Birgir W. Høgnesen*